## UTTAN ÚR HEIMI

## Dollarin kostar arbeiðspláss

Vinnuráðið hjá donsku fakfelagsrørsluni roknar við, at tað stóra fallið á amerikanska dollaranum fer at halda fram í ár, og at tað fer at kosta dønum nógv túsund arbeiðspláss.

Sum gongdin nú er, roknar vinnuráðið við, at dollarafallið fer at gera enda á 74.000 donskum arbeiðsplássum í hesum árinum. Heldur dollaravirðið sær á tí støðið, sum tað er nú, fara 36.000 arbeiðspláss at hvørva í ár og 10.000 afturat næsta ár. Samstundis sigur vinnuráðið, at í 2003 kostaði fallið á dollaranum 28.000 donsk arbeiðspláss.

Virðið á donsku krónuni er tengt at evruni, so tá dollarin fellur í virði samanborið við evruna, fellur hann eisini samanborið við donsku krónuna. Hetta kemur donskum ferðandi í USA væl við, men tað gagnar harafturímóti ikki vinnulívinum. Tí tá tær donsku vørurnar dýrka, hava amerikanararnir sum vera man minni hug at keypa danskar vørur, skrivar Ritzau.

## Ikki so stórur vandi

Týska innanríkisráðið royndi um vikuskiftið at sissa fólk, eftir at fleiri fjølmiðlar høvdu sagt, at løgreglan og fregnartænasturnar høvdu fingið ábendingar um komandi yvirgangsatsóknir í Týsklandi.

Talsmaðurin hjá innanríkisráðnum í Berlin segði sunnudagin, at tað er altíð vandi fyri, at Týskland verður álopsmál hjá yvirgangsfelagsskapum, men í løtuni er einki, sum bendir á, at nakar hevur ætlanir um slíkt álop, segði hann. Formaðurin í løgreglufelagnum, Konrad Freiberg, segði, at vandin fyri yvirgangi í Týsklandi er stórur, og hann mælti tí myndugleikunum til at geva løgregluni meiri fólk.

Blaðið Welt am Sonntag endurgav sunnudagin eina frágreiðing, sum útlendskar fregnartænastur í Týsklandi hava skrivað. Sambært blaðnum eru serliga amerikonsk, bretsk og jødisk mál í Týsklandi í vanda fyri at verða álopin.

## Stevna tí almenna

Tað gerst alt meiri vanligt í Danmark, at fólk leggja sak ímóti statinum, skrivar Jyllandsposturin.

Í flestu førum eru tað fólk, sum eru misnøgd við avgerðir hjá tí almenna. Serliga avgerðir í almannamálum hava fólk ilt við at góðtaka, um tær ganga teimum ímóti, og alt fleiri og fleiri velja at stevna statinum fyri at fáa dómsvaldið at ganga teimum á møti. Í fleiri førum er tað eisini hent, at Hægstirættur hevur broytt avgerðir hjá teimum almennu kærumyndugleikunum á almannaøkinum.

At fólk stevna statinum kostar tí almenna nógv arbeiði og nógvar pengar. Sambært Jyllandspostinum nýtti kamaradvokaturin 52 milliónir krónur til slík mál í 1995, men í 2002 vóru útreiðslurnar 122 milliónmir krónur. Í almannamálaráðnum siga tey tað sama. Har arbeiða tjúgu fólk burturav við kærum frá borgarum.

## Hann leitar enn

Á níggjundu hædd á høvuðsløgreglustøðini í Stockholm situr tann 65 ára gamli Stig Edquist, sum enn tann dag í dag hevur sum høvuðsarbeiði at finna mannin, sum fyri átjan árum síðani myrdi svenska forsætisráðharran Olof Palme. Hann er ikki einsamallur, men hevur fjúrtan løgreglumenn afturat sær.

Síðani morðið í 1986 hava 130 fólk viðgingið at hava myrt Palme, men einki teirra hevur kortini víst seg at vera drápsmaðurin. At tað gekk so nógv skjótari at finna drápsmannin hjá Onnu Lindh, uttanríkisráðharra heldur Stig Edquist ikki vera so løgið. Hann vísir á, at eitt sjónbandstól tók myndir av Mijailo Mijailovic, og harafturat fann løgreglan knívin, sum hann nýtti. Við Palme-morðinum er øðrvísi. Har var einki myndatól, og morðvápnið er ongantíð funnið, sigur Stig Edquist.

Aftan á tann 28. februar í 2011 sleppur drápsmaðurin hjá Olof Palme undan rættarsókn, tí tá er málið fyrnað. Stig Edquist sigur, at eydnast tað at finna skammbyrsuna, sum Palme varð skotin við, væntar hann, at málið verður loyst innan ta tíð.

# Oljufeløgini minni áhuga fyri norskum øki

**Fyri seks árum síðani nýttu 25 tey størstu oljufeløgini í heiminum níggju prosent av sínum leitiútreiðslur til norska landgrunnin. Í dag er parturin minni enn trý prosent**

OLJULEITING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er ikki bara á føroyska landgrunninum, at útlendsku oljufeløgini hava minni hug at leita eftir olju og gassi enn fyri nøkrum árum síðani. Undan tí stóra fallinum í oljuprísunum í 1998 brúktu 25 tey størstu oljufeløgini í heiminum 15 milliardir dollarar til leiting, men longu í 1999 var talið 10 milliardir dollarar. Samstundis tóku fleiri feløg seg saman.

Norðmenn hava eisini fingið at kenna, at tey stóru útlendsku oljufeløgini hava ikki so góðan hug at nýta pengar upp á leiting í norskum øki longur. Sambært Aftenposten nýttu 25 try størstu feløgini níggju prosent av sínum leitiútreiðslum til norsk øki í 1997. Í 2002 var hesin parturin ímillum trý og fýra prosent, og nú er hann niðan fyri trý prosent.

Blaðið vísir á, at tá norðmenn høvdu sítt 18. útbjóðingarumfar, løgdu feløg sum Exxon, Total, BP og Shell ikki í at bjóða. Samstundis hevur gongdin verið tann, at tey bæði norsku feløgini Statoil og Hydro nýta ein altsamt størri part av teirra leitiútreiðslum aðrastaðni enn í norskum øki.

# Fyrsta valið




*Í gjár var tað fyrsta uppstillingarvalið hjá demokratunum upp undir forsetavalið í USA í heyst. Valið var í statinum Iowa, og sambært kanningunum fór John Kerry at vinna. Men trý onnur valevni, Dick Gephardt, Howard Dean og John Edwards, vóru í hølunum á honum.*

# Vit eru aftur í 30'unum

**Ísraelski sendiharrin í Svøríki hevur elvt til eina diplomatiska kreppu, eftir at hann oyðilegði eitt listarverk á einari framsýning í Stockholm. Sendiharrin heldur, at evropeiska hugsanin um jødarnar er sum í tríatiárunum**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Eg og mong við mær stúra fyri, at ein vanlukka kann henda. Hetta er sum í tríatiárunum, sigur ísraelski sendiharrin í Svøríki, Zvi Mazel og sipar til, at eftir hansara tykki er jødahatur aftur farið at gera um seg í Evropa.

Sendiharrin hevur elvt til ruðuleika, eftir at hann fríggjadagin oyðilegði eitt listarverk á einari framsýning í Stockholm. Listarverkið var ein lítil bátur við einari mynd av palestinsku kvinnuni Hanadi Jaradat, sum við einari sjálvmorðsbumbu beindi fyri 21 fólkum í Haifa í oktober.

Sambært sendiharranum var verkið ein háðan ímóti teimum, sum doyðu í álopinum. Tað heldur ísraelska stjórnin eisini. Hon hevur kravt, at svenska stjórnin skal taka verkið burtur av framsýningini, men tað vil stjórnin hjá Gøran Persson ikki.

Sunnudagin sendi ísraelska uttanríkisráðið boð eftir svenska sendiharranum har, og í gjár skuldi Zvi Mazel, sendiharri, á fund í svenska uttanríkisráðnum.



## VALGREINAR

# Tað góða samfelagið

**Jóannes Eidesgaard**
*Formaður Føroya Javnaðarfloks, tingmaður og valevni í Suðuroynni*



Javnaðarflokkurin hevur tað góða samfelagið sum mál. Hetta merkir, at tað einstaka menniskja er okkara mál.

Javnaðarflokkurin raðfestir tí tað góða samfelagið fram um alt annað.

Í tí góða samfelagum er tjóðskaparliga semjan um sjálvræðisspurningin eitt virðiligt og sjálvsagt mál.

Tann beiða tjóðskaparliga semjan um einar sjálvstøðugar Føroyar innan ríkisfelagsskapin skal tryggja okkum orku og arbeiðsfrið til at byggja tað góða samfelagið.

Tað góða samfelagið er samfelagið fyri øll og ikki bert fyri tey fáu. Tað góða samfelagið er eitt samfelag, har eldri og gomul verða viðfarin við sóma og virðing, har tey fáa hjálp og røkt, sum er á støði við tað besta í okkara grannalondum.

Í tí góða samfelagnum eru rættartrygd og persónligt frælsi, solidaritetur og sosialt rættvísi, góð barnakor, útbúgving, mentan og list, góður bústaður sjálvsøgd og høgt raðfest mannarættindi.

Hesi eru okkara yvirskipaðu mál.

Javnaðarflokkurin hevur í valskrá síni víst á eina greiða og miðvísa ætlan til tess at røkka málunum fyri tað góða samfelagið.

Vit skulu seta upp nýggjar karmar og skapa nýggjar og sterkar fortreytir fyri tí góða samfelagnum.

**Hetta gera vit**

- Við eini nýggjari strategi, ið verður løgd, og sum skal fevna um menning av nýggjum vinnum og nýggjum marknaðum og sum heild um eina røð av stimbrandi tiltøkum eisini fyri hóttar vinnur av samfelagsligum týdningi uttan tó at fevna um rakstrarstudning til vinnuna, búskapurin skal hava fleiri bein at standa á, tí skal dentur leggjast á at framleiða háprísvørur við útbúnari arbeiðsmegi Útbúgvingartilboð til tímalønt og serliga til tey í fiskivinnuni á landi við fullari lønarsamsýning.

Karmarnir gerast støðugir, so vinnan fær raðfest og lagt sínar ætlanir

Við fiskidagamarknaðinum kunnu vit menna fiskivinnu munandi og geva ungum monnum nýggjar møguleikar.

- Við einum nýskapandi sosial- og familjupolitikki, sum fevnir um eina nýggja trýstreingaða pensiónsskipan, ið tryggjar øllum sømiliga pensionistatilveru, børnum skúlamat og mjólk, barnafamiljum ansingarpláss og systkinavslátt ódýra mjólk samt lægri mjólkaprísir og eina nýskipan av íbúðarmarknaðinum.
- Við at endurskoða fólkaskúlalógina og málið um arbeiðstíðina hjá lærarunum, við at endurskoða miðnámsskúlaøkið og tryggja ókeypis lærutilfar.
- Við at orða ein nýggjan granskingarpolitikk og at endurskoða hægru útbúgvingarnar – styrkja læraraskúla og fróðskaparsetur
- Við at samskipa sjúkrahúsverkið og tryggja nýggja landssjúkrahúsinum arbeiðsumstøður
- Við burðardyggum umhvørvispolitikki

---------------

Soleiðis eru Javnaðarflokksins mál og soleiðis vilja vit vinna á mál. Tíðin er komin til eina vending – til eitt politiskt streymaskifti, har fokus av álvara verður sett á vælferðina hjá føroyingum.

Hetta krevur politiskan arbeiðsfrið – henda frið vinna vit við tjóðskaparligu semjuni um økt sjálvræði innan ríksfelagskapin

Hetta krevur nýhugsan á snøgt sagt øllum politiskum økjum og hesa nýhugsan hava vit givið okkara boð uppá við tí valsskrá, sum vit lagt fyri Føroya fólk. Hetta krevur sínamillum virðing, samstarv og breiðar politiskar semjur tvørtur um gomul og nýggj politisk mørk. Vit hava víst, hvussu hetta kann fremjast.

**Góðu veljarar!**

- Tit hava nú eitt einastandandi høvi til at tryggja hetta politiska streymaskiftið. Tit kunnu skapa ta tjóðskaparligu semjuna og byggja nýggjar brýr millum føroyingar.
- Tit kunnu tryggja tykkum, at tykkara gerandisdagur og tykkara dagliga lív aftur koma ovast upp á politisku dagsskránna. Hetta kunnu tit gera við at atkvøða fyri Javnaðarflokkinum valdagin.

Gott val og alt tað besta!

# Menning er at flyta Føroyar inn í framtíðina

**Helena Dam á Neystabø**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Vit kunnu í dag fegnast um, at tann breiða semjan í sjálvstýrismálinum er í eygsjón. Ongantíð áður hevur tað tí verið meira umráðandi at vit menna okkum sum fólk. Menning er at flyta Føroyar inn í framtíðina.

Tú spyrt, hvat ið hendir í Føroyum um oljan kemur? - ella hvussu Føroyar síggja út um 10 ár? Men tú fært einki haldgott svar, tí eingin arbeiðir burturav við at svara slíkum týdningarmiklum spurningum. Okkara lærda fólk fæst mest við umsiting og ikki við at skapa nakað nýtt.

Javnaðarflokkurin fer at seta gongd á miðvísa vinnulívsmenning -

Vinnu- og granskingarsamstarv við umheimin skal troytast, og ikki gleppa okkum av hondum, tí møguleikarnir eru nógvir, men vit brúka teir ikki.

Fylgja vit ikki við, verða vit afturúrsiligd.

Tað er tankin sum flytir fjøll.

# Eg havi innlit, vitan og skil á niðanfyristandandi…

**Joan Ziskason**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



**…og kann tí bjóða meg fram at arbeiða fyri teg ella tykkum við hesum:**

- At psykiatrilógin kemur á tingborð
- At arbeiðsumstøðirnar í heilsuverkinum verða betri
- At rentustuðulin verður varveittur
- At barnafamiljan hevur tað gott
- At tey gomlu hava tað gott
- At eftirlønin kemur uppá pláss
- At arbeiðsrættur ikki skal setast í verk
- At varðveita fakfelagsrættin

At nútímansgera Føroyar

# Tryggur politikkur á Sjálvbjargnisleið

**Helena Dam á Neystabø**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Í veljarakanning sum Sjónvarp Føroya almannakunngjørdi leygarkvøldið er tað greitt, at ein heilt stórur meiriluti av Føroya fólki ynskir eina hóvliga sjálvstýrisgongd. Bara nøkur fá procent ynskja at ongar broytingar skulu vera, og somuleiðis ynskja bara nøkur fá procent, at áramál verður sett á.

Sjálvstýristilgongd føroyinga má tí ikki sleppa at klúgva tjóðina í helvt, men hon má heldur ikki steðga upp.

Javnaðarflokkurin hevur orðað eitt uppskot til eina sjálvstýrislóg, sum kann vera grundarlag undir einari tjóðskaparligari semju um framtíðarstøðu Føroya.

Í stuttum er upskotið til sjálvstýrislóg Javnaðarfloksins:

**"At vit áseta viðurskiftini millum Føroyar og Danmark í einum sjálvstýrissáttmála sum ein politiskan sáttmála millum tvey sjálvstøðug lond, ið viðurkenna hvørt annað sum javnbjóðis tjóðir í einum felagskapi - ríkisfelagsskapi, samveldi ella frælsum felagsskapi. Hesin sáttmáli avmarkar ikki sjálvsavgerðarrætt føroyinga frameftir."**

Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum er eitt haldgott grundarlag undir teirri tjóðskaparligu semjuni, sum øll leingjast eftir.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!